gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Kløkkur og keddur

**– Løgmaður fer ikki av sær sjálvum út í fjølmiðlarnar soleiðis, tað álit havi eg á honum, sigur ein vónbrotin Karsten Hansen, nú løgmaður í Útvarpinum hevur nevnt nýggja sáttmálan við Starvsmannafelagið fyri eina skrúvu uttan enda.**

**- Tað snýr seg um menniskju, staðfestir Karsten Hansen. Eg eri nøgdur og mótparturin er nøgdur, so hví henda øsing?, spyr fíggjarmálaráðharrin, ið metir, at ikki er frítt, at tíðindafólk her hava spælt løgmann og fíggjarmálaráðharan út hvør móti øðrum**


Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri

SÁTTMÁLA-VIÐURSKIFTI
*Dagfinn Olsen*

Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, hevur frá sjúkralegu síni í Danmark alla tíðina verið við í samráðingunum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Hann er væl nøgdur við nýggju semjuna og gjørdist kløkkur, og ikki sørt keddur, tá hann hoyrdi metingarnar hjá løgmanni um nýggja sáttmálan.

Løgmaður, Anfinn Kallsberg, metti í ÚF mánakvøldið, at hetta var skrúvan uttan enda og at betri hevði verið við skattalætta.

– Eg helt meg eisini hoyra hann siga, at hann kendi ikki sáttmálan og síðani komu nøkur tøl, ið einki skil var á, t.d. nevndi hann 200 milliónir, sigur Karsten Hansen.

– Eg greiddi løgmanni frá semjuni, áðrenn undirskrivingin fór fram. Eg havi síðani einki hoyrt frá løgmanni, sigur Karsten Hansen.

– Tíðindafólk hava prátað við løgmann og við meg, men eg fekk einki at vita um, hvat løgmaður metti, so ikki er frítt, at her kanska verður roynt at spæla okkum út hvør móti øðrum, sigur Karsten Hansen, sum heldur okkurt av hesum vera tikið úr samanhanginum, tí annars skilir hann púrt einki.

### Álit á løgmanni

– Men tað álit havi eg á løgmanni, at hann er ikki av sær sjálvum farin út í fjølmiðlarnar soleiðis. Eg trúgvi ikki, tað hongur soleiðis saman. Men heldur løgmaður hinvegin, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur borið seg skeivt at, so eigur hann at koma til mín, metir Karsten Hansen.

– Men løgmaður og eg hava havt eitt álitisforhold og hava vanliga ikki hartað hvønn annan í fjølmiðlunum, staðfestir Karsten Hansen, sum heldur ikki skilir, hví neyðugt er at ringja til løgmann at spyrja um málsøkini hjá fíggjarmálaráðharranum, hóast hesin er uttanlands. Hetta metir hann sum óvanligt og heldur óseriøst.

– Eg havi verið við til samráðingarnar alla tíðina, hjálptur av telefon og faxi og øðrum. Eg eri væl nøgdur og tað er Starvsmannafelagið eisini, so eg skilji ikki øsingina, sigur Karsten Hansen.

### Snýr seg um menniskju

– Fyri tveimum árum síðani var verkfall og stríð um lønarskipan, sum øll minnast. Tá setti eg mær fyri, at soleiðis kann ein ikki fara við fólki. Nú er ein sáttmáli fingin uppá 2 ár og 7 mánaðir og tað eigur ein at hava í huga. T.d. var 2 ára sáttmálin við Føroya Tele seinast dýrari enn hesin, samanber Karsten Hansen.

– Kostnaðurin av nýggja sáttmálanum við Starvsmannafelagið er uttan lønarskipanina 3,5% árliga. Tað er t.d. lítið í mun til, hvat gongur fyri seg í Løgtinginum, eittnú við keypi av bygningum og øðrum, sigur Karsten Hansen.

– Tað snýr seg um menniskju og um, at hugsa má um tey, í eru og gerast eldri. Alt heta nýtist ikki at kosta samfelagnum nakað, um ein torir at taka avgerðir, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

### Skattalætin er komin

Løgmaður hevur í fjølmiðlunum sagt, at ynskiligt hevði verið við skattalætta.

– Skattalættin er komin á nýggjárinum. Talan var um 50 milliónir og síðani aftur í januar, so vit tosa um eini 80 milliónir, sigur Karsten Hansen.

– Ein kann jú heldur ikki samráðast við fakfeløgini um skattalætta, metir Karsten Hansen.

### Álit

– Mín uppgáva er at gera tað, eg havi sett mær fyri, so leingi eg havi ávirkan. Men viðvíkjandi útsøgnum løgmans, so meti eg, at hatta er bara ikki hann! Hatta má vera tikið úr samanhanginum. Vit eru ikki samdir politiskt, men tað snýr seg eisini um at fara virðiliga fram, staðfestir Karsten Hansen.

– Álit er ikki nakað ein fær frá øðrum, men nakað ein vísur, sigur Karsten Hansen, ið ikki dylir, at hann er kløkkur og keddur, nú hann annars hevði fingið í lag ein sáttmála, ið báðir samráðingarpartar vóru nøgdir við.

Tað eydnaðist tíverri ikki at fá viðmerking frá løgmanni.

**Karsten Hansen:**

– Tað snýr seg um menniskju

– Heldur løgmaður, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur borið seg skeivt at, so eigur hann at koma til mín

– Fyri tveimum árum síðani var verkfall og stríð um lønarskipan, sum øll minnast. Tá setti eg mær fyri, at soleiðis kann ein ikki fara við fólki

– Álit er ikki nakað ein fær frá øðrum, men nakað ein vísur

# Tey lægst løntu nógv í tali

**Nýggi sáttmálin hjá Starvsmannafelagnum gevur teimum lægst løntu størstu lønarhækkingina. Og tey lægst løntu eru ein stórur partur av limum felagsins**

SÁTTMÁLA-VIÐURSKIFTI
*Dagfinn Olsen*

Bæði Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið siga seg vera nøgd við nýggja sáttmálan millum partarnar.

Nýggi sáttmálin er uppá eitt langt tíðarskeið, 2 ár og 7 mánaðir. Sáttmálin inniheldur eina lønarhækking uppá 7,5%. Henda fellur í trimum. Eftirlønin hækkar við 2,5%, so hon verður 8% í 2003. Samlaða hækking verður set til 12,5%. Miðalhækking hjá limum Starvsmannafelagsins er eini 1000 krónur um mánaðin.

Harafturat sigur sáttmálin, at serliga tey lægst løntu í Starvsmannafelagnum, sonevndi lægstlønarbólkurin, fær størstu hækkingina.

Gunleivur Dalsgarð, formaður, sigur, at hesin starvsbólkur ikki er so lítil. Útvið 60% av limum felagsins eru í hesum bólkinum, sum fær størstu ágóðarnar.

16 feløg á almenna arbeiðsmarknaðinum standa nú í røð at slepa til samráðingar, men tó hendir einki, fyrr enn páskahøgtíðin er av.

# Góður sáttmáli

**Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag, Karl Johansen, metir, at nýggi sáttmálin millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið er góður. Hann sigur, at fyrstu samráðingarnar altíð eru leiðbeinandi, men vil kortini ikki siga, hvat hansara felag ætlar gera og metir vera nøktandi, men lønin liggur fremst.**



SÁTTMÁLA-VIÐURSKIFTI
*Dagfinn Olsen*

– Jú, Starvsmannafelagið hevur fingið nógv. Fyrstu samráðingarnar eru altíð leiðbeinandi og tískil er léttari fyri tey, ið koma aftaná. men sáttmálin er uppá 2 ár og 7 mánaðir, so felagið verður ikki fyrst at samráðast næstuferð, sigur Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Hann vil tó ikki siga, hvat hansara felag metir vera nøktandi og ringt er at gera øll nøgd, metir hann.

### Luksus

– Vit hava nú fingið tað, ið kallast spesialarbeiðaraløn. Nú er veruleikin jú tann, at øll eru spesialarbeiðarar, tí ein skal duga okkurt, tá ein er á arbeiðsmarknaðinum í dag, sigur Karl Johansen.

Hann sigur, at hjá teimum er tað nú einaferð so, at talan er um tímaløn og at lønin liggur fremst. Hann hevur ikki verið í samband við onnur feløg, og veit tí ikki, um nakrar ætlanir eru um nøkur av somu nýhugsanum, sum Starvsmannafelagið hevur í sínum sáttmála.

– Lønin liggur fremst, hitt er luksus, sigur Karl Johansen í stuttari viðmerking.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



Bjarni Djurholm um semjuna:

# Løtuvinningur hjá lønmóttakarum

**Landsstýrismaðurin við vinnumálum, Bjarni Djurholm, er ikki serliga fegin um semjuna, sum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið hava funnið fram til. Hann sigur hetta vera løtuvinning hjá lønmóttakarum og væntar, at vinnulívið fer at knógva undir lønarvøkstrinum**


*Bjarni Djurholm er ikki fegin um tann stóra lønarvøksturin, sum Starvsmannafelagið nú fær. Hann heldur, at tað er løtuvinningur fyri lønmóttakaran*

LØNARVØKSTUR
*Stefan í Skorini*

Bjarni Djurholm landsstýrismaður fyri Fólkaflokkin væntar, at hetta samráðingarúrslitið fer at gera samráðingarnar á privata arbeiðsmarknaðinum truplar, tí tað er væntandi, at onnur fakfeløg eisini fara at krevja sama ella størri lønarvøkstur.

Hann er sostatt ikki nógv fyri lønarvøkstrinum, sum Fíggjarmálastýrið hevur játtað at lata limum í Starvsmannafelagnum. Vøksturin er tilsamans 12,5% í hálvttriðja ár. Fólkaflokkurin hevur sýnt sína ónøgd við semjuna, tí lønarvøksturin er ov høgur.

– Sæð í vinnuligum høpi, so fer hetta úrslitið at ávirka samráðingarnar á privata arbeiðsmarknaðinum, sigur Bjarni Djurholm, sum væntar, at kappingarførið hjá vinnuni verður sera meint rakt.

Bjarni Djurholm vísir á, nú lunnar eru lagdir undir lønarhækkanir uppá 12,5%, at almennu kassarnir gjalda 1,6 milliardir krónur um árið í lønum, og nú so nógv prosent skulu leggjast omaná. Talan er um 200 milliónir eyka útreiðslur um árið, vísir Bjarni á.

– Vit vita, at tá bruttolønin veksur, so hækkar kostnaðarstøðið, og tað merkir at vørur og tænastur gerast dýrari. Tí merkir brúkarin sjáldan nakað positivt í síðsta enda, sigur Bjarni Djurholm.

Bjarni Djurholm vísir í hesum sambandi á, at við seinastu lønarhækkan upplivdu vit, at vørur og tænastur dýrkaðu, og tað verður tað sama hesuferð. Tí fer henda lønarhækkanin neyvan at gagna føroyska vinnulívinum og fer neyvan at gagna føroyska lønmótakaranum í longdini.

### Heldur skattalætta

Landsstýrismaðurin sigur, at tað sjálvsagt er torført at koma aftur um aftur og finnast at eini semju, tá hon er undirskrivað av báðum pørtum, og at tað er landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, Karsten Hansen, sum finnur fram til semjuna.

Bjarni Djurholm slær fast, at reallønin hækkar neyvan sum úrslit av hesi semjuni, og tí tala hann og Fólkaflokkurin heldur fyri at halda aftur í økingini av teimum almennu útreiðslunum og ístaðin veita skattalætta, tí tá hækkar reallønin.

Landsstýrismaðurin vísir hinvegin á, at útreiðslurnar av hesum sáttmálanum svara til íløguna av einum undirsjóvartunli undir Vestmannasund um árið. Tí heldur Bjarni, at tað er ein ávís andsøgn í kritikkinum frá Tjóðveldisflokkinum í síðstu viku, tá hann ákærdi Fólkaflokkin fyri útgjaring.

– Samanlagt kann mann siga, at Fíggjarmálastýrið hevur tikið nakað rívan til, og fakfeløgini kunnu sjálvsagt vera væl nøgd við úrslitið. Spurningurin er bara, um limirnir yvirhøvur fáa nakra gleði av hasum, og um samfelagið ikki fer at líða undir tí, tá sama um kemur, sigur Bjarni Djurholm at enda.

Myndatextur: Bjarni Djurholm er ikki fegin um tann stóra lønarvøksturin, sum Starvsmannafelagið nú fær. Hann heldur, at tað er løtuvinningur fyri lønmóttakaran

# Flux til Grønlands

**Í dag fer Prix Føroyar finalubólkurin Flux til Grønlends at leika**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Bólkurin Flux er væl umtóktur og ungur tónleikabólkur. Bólkur hevur á øðrum sinni leikt seg í Prix Føroyar finaluna. Bólkurin er sermerktur, eisinitá umræður tað, ið nevnt verður image, fáir bólkar eri eins litríkir, og Flux..

Í dag far menninir í Flux til Grønlands at leika. Teir leika til ein festival í Aasiat, Nibiaafestival, og eisini aðrastaðir. Teir skulu millum annað leika við saman við bólkinum Chilli Friday, ið er sera kendur bólkur har á leiðum. Talan er um kanadiskar inuitar, ið mynda bólkin, ið er millum teir fremstu har á leið.

Flux fer at leggja dent á at spæla egið tilfar á ferðini. Tað eru grønlendingar, ið skipa fyri, í samstarvi við Norðurlandahúsið, ið eisini hevur stuðlað Flux við ferðini.

Flux koma aftur 17. apríl og sostatt í góðari tíð til Prix Føroyar finaluna leygardagin 21. apríl.



# Poul Michelsen nýggjur finskur konsul

*Stefan í Skorini*

Poul Michelsen verður í næstum útnevndur nýggjur finskur konsul í Føroyum. Hetta váttar finska ambassadan í Keypmannahavn.

Enn er tó eingin almenn fráboðan komin frá hvørki finska konslinum í Keypmannahavn ella ambassaduni.

Finski konsulin í Keypmannahavn hevur lagt ætlanir um at koma til Føroyar í hesum sambandi, og tá verður Poul Michelsen alment útnevndur finskur konsul. Hetta verður væntandi einaferð eftir páskir.


*Poul Michelsen, nýggjur finskur konsul*

TYRLUTÆNASTAN
HJÁ ATLANTIC AIRWAYS



TYRLUFLÚGVING Á PÁSKUM
Flogið verður Skírishósdag sum fríggjadag.
Flogið verður ikki Langa Fríggjadag.

Flogið verður 2. Páskadag sum sunnudag.
Flogið verður ikki 1. Páskadag.

ATLANTIC AIRWAYS
Tel 341 000 · Fax 341 001
www.atlantic.fo